# Skapa tær eitt arbeiðspláss

**... og børnunum eitt spælipláss**



**Til Útibarnagarðin í Runavíkar Kommunu, verður søkt eftir leiðara at byrja fyrst í 2002.**

Útibarnagarðurin fer at halda til í skúlanum í Lamba, sum verður útbygdur til endamálið. Á stovninum verða 25 børn í aldrinum 5-7 ár.

**Vit ynskja**, at tú ert útbúgvin pedagog, at tú dámar væl at vera úti í náttúruni, ert kreativ/ur, hevur hug og árræði at skapa ein fjøl-broyttan og tryggan dag saman við børnunum og hevur góð samstarvsevnir.

**Løn** smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunurnar.

**Skrivlig umsókn**, saman við upplýsingum um útbúgvingar, royndir og møguligum viðmælum skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 5/1-2002



**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur • FO-620 Saltangará
Tel. 41 70 00 • Fax 41 70 01
e-mail: runavik@runavik.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3275
Navn: Sp/f Body Care
Adressa: Stangavegur 6, 700 Klaksvík
Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 21.11.2001
Viðtøkudato: 21.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Margretha Petersen, Stangavegur 6, 700 Klaksvík.
Stjórn: Margretha Petersen, Stangavegur 6, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðan Jóannis Skorheim, Klaksvíksvegur 28, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 21.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka venjingarmiðstøð, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 6. desember 2001

Kristin Balle


Sosialurin



## Stjóri til P/F Fiskaaling

**Søkt verður eftir stjóra til P/F Fiskaaling.**
Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjóða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Viðkomandi, ið settur verður, hevur ábyrgdina av at felagið við atliti til endamálið verður ment handilsliga.

**Høvuðsuppgávurnar hjá P/F Fiskaaling eru fylgjandi:**
- at gera vísindaligar royndir í samband við aling av fiski, skeljadýrum v.m. herímillum skapa møguleikar fyri aling av møguligum nýggjum fiska- og skeljasløgum
- at gera royndir við nýggjum aliøkjum
- við kynbótaarbeiði at bøta um føroyskt alitilfar og við sølu av framleiðslum burtur úr hesum spjaða framgongdina skjótast gjørligt til vinnuna
- at reka vinnuligt virksemi innan virksemisøki felagsins

**P/F Fiskaaling** rekur vinnuligt virksemi innan kynbótaarbeiði við laksum og sílum, og framleiðir felagið 2000 - 3000 litrar av laksarognum árliga umframt nakað av sílarognum.

**Ynskiligt er at umsøkjarin hevur fylgjandi førleika:**
- útbúgving frá hægri lærustovni
- góð leiðslu- og samstarvsevni
- royndir at standa fyri vinnuligum virksemi
- evni at seta fyriskipanir í verk
- kunnleika til fíggjarstýring
- kunnleiki til alivinnuna og til lívfrøði er ein fyrimunur.

**Setanartreytir**
Arbeiðsstaðið kemur at vera Við Áir, har P/F Fiskaaling hevur høvuðsskrivstovu. Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við Janet Fríðu Johannesen, nevndarformann tlf. 319685, fartlf. 212211 ella við telduposti: jj@atlanticon.fo.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skal sendast til Janet Fríðu Johannesen, co/ Atlanticon, Bryggjubakki 4, Postboks 263, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 27. desember 2001. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. P/F Fiskaaling hevur virsemi Við Áir, í Nesvík, í Skopun og í Hesti. Samlaða starvsfólkatalið er 25. Samlaði umsetningurin í felagnum seinastu árini hevur verið umleið 25 mill. kr. P/F Fiskaaling stendur fyri kynbótaarbeiði við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum, er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Arbeitt verður eisini við at menna kalva og onnur nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Næstu árini er ætlanin at leggja stóran dent á granskingarætlanir, sum náttúrliga hoyra undir virkisøki felagsins. Meira fæst at vita um felagið á www.fiskaaling.fo.

team 85 • 316511

P/f Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes



**The Windsmith**
v/ John S. Müller



**Ring og royn**
eitt blásaraljóðføri við ráðgeving frá útbúnum og royndum fakmanni

**Søla**
Nýggj Yamaha blásaraljóðføri tøk

**Tænasta**
3 mðr. ókeypis fínstilling av ljóðførum, sum latin eru av blásaraverkstaðnum við Marknagilsvegin 18

fartlf. 219721 · e-mail: windsmit@post.olivant.fo



Sosialurin -tað loysir seg



VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir



## Diabetesfundur í Suðuroy

Upplýsandi fundur verður í Suðuroy mikukvøldið 12/12 kl. 19.00 í kantinuni á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Lækni, kostráðgevi og fólk frá diabetesfelagnum verða við á fundinum.

Fundurin er almennur.

**Diabetesfelag Føroya**




# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**BMW 525 TDS**
aut. gear, árg. 93, sýnaður okt. 2001, í góðum standi, til sølu. Møguliga kann annar bilur ganga inn í keypið. Prísuppskot: 135.000 kr. Meira fæst at vita á
*tlf. 213577*

**SUZUKI SWIFT**
4 x 4, treingir til ábøtur, fyri hægst bjóðandi.
*Tlf. 213810 ella 318808*

**SKODA FELICIA LX 1.3**
árg. 96, km 70.000. Vælhildin bilur til yvirtøku 1. jan. 2002. Prísur kr. 45.000.
*Ring eftir kl. 17 á tlf. 321221*

**TIL SØLU**
Fýra titanium felgur, 7x15" 5 hol, við tveimum dekkum, 205-50 R 15, passa til Toyota Carina 2, Carina E og Camry.
*Tlf. 227922*

**EYKALUTIR**
til Toyota Hiace diesel, árg. 90-95, til sølu.
*Tlf. 227922*

**TIL SØLU**
Chevrolet Malibu, árg. 80, til sølu. Treingir til eina bøtandi hond. Sýnaður í sept. 01. Kostnaður 4.000 kr.
*Tlf. 320202, e. kl. 18*

**TIL SØLU**
Honda CX 500, árg. 79.
*Tlf. 321505*

**TIL SØLU**
VW Golf, árg. 87, til sølu fyri uml. 9.000 kr.
*Tlf. 215887*

**NISSAN CHERRY 1.3**
Árg. 86, koyrt 120.000 km. til sølu fyri kr. 5.000,00.
*Tlf. 250053*

**CAMPINGVOGNUR**
til 7 persónar, hevur gassovn, gasskomfýr, kuldaskáp og annað, til sølu fyri 14.000 kr.
*Tlf. 223527*

**VOLVO 244**
árg. 81, nýsýnaður og í góðum mekaniskum standi, er skøddur til veturin, til sølu fyri 3.500 kr.
*Tlf. 373889*

**TIL SØLU**
Svartur Opel Kadett 2.0 GSI, koyrt 176.000 km, bíliga til sølu.
*Tlf. 251414*

**TIL SØLU**
Bláur VW Golf 1.9 diesel, árg. 92, til sølu.
*Tlf. 223352*

**TIL SØLU**
4 kavadekk við felgu, stødd 165/14, til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 254618*

**TIL SØLU**
Mazda B-2500 pick up, koyrt 19.400 km, árg. 11/05/2000, til sølu fyri 123.000 kr.
*Tlf. 457860 / 224496*

**FORD SCORPIO 2,4**
bíliga til sølu.
*Tlf. 312998 - 255333*

**FORD SIERRA**
Árg. 87 bíliga til sølu. Nýsýnaður.
*Tlf. 423198*

**DAIHATSU CHARMANT**
í góðum standi, til sølu fyri 10.000 kr.
*Tlf. 310352*

**TIL SØLU**
Volvo 440 TDI, árg. 7/96, diesel, 3 mðr. trygd. Hyundai Accent 1,3, árg. 5/00, nógv útgerð, 3 mðr. trygd. Audi 100 2,5 TDI, sedan, árg. 10/93, diesel, 3 mðr. trygd. Audi 80 1,9 TDI, árg. 5/94, diesel, 3 mðr. trygd, BMW 525 tds, automat., árg. 7/96, nógv útgerð, boð undir 250.000 ongan áhuga, 3 mðr. trygd. Spf. Úrvalsbilar
*Tlf. 444943 - 284943*

**HONDA ACCORD 2.0**
Honda Accord 2.0 til sølu sum eykadeilir.
*Tlf. 226376*

**KIA PRIDE 1.3 TIL SØLU**
Árg. 2000, km 28.000, vælhildin og sera økonomiskur silvurlittur stationcar við 5 hurðum, sleipikróki, servostýring, elrútum o.ø. Kr. 85.000,-.
*Tlf. 310441*

**OPEL CORSA**
árg. 89, bíliga til sølu.
*Tlf. 257111*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ........................ |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12$^{00}$, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:…………………………………………..
Bústaður:……………………………………
Bygd/býur:…………………………………
Tlf.: ………....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

## Arbeiði

**HØVUÐSREINGERING**
Tilkomin, røsk og dugnalig kvinna søkist at gera reint í privatheimi í Miðvági beint eftir nýggjár. Góð løn. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
*Bill. mrk. 1236-6*

**HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING**
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamal innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
*tlf. 215214*

**HYGG HER**
Eg átaki mær at vaska fyri fólk til jólar, men bert í Klaksvík. Hevur hetta tín áhuga, so ring á
*tlf. 255845*

## Barnaútgerð

**SIMO BARNAVOGNUR**
Ein svartur Simo vognur av slagnum Alu til sølu v/ regnslagi, tasku og fluguneti fyri 3.000 kr.
*Tlf. 318024, e. kl. 16*

**TREMMUSONG TIL SØLU**
Gomul myrkabrún tremmusong til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 226686 - 315698*

**STÓLUR/VOGNUR**
Kombineraður, BRIO-framleiðsla, við kalesju, til sølu.
*Ringið 313356 aftaná kl. 18*

**BARNAVOGNUR**
Myrkabáur Odder barnavognur til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 321715*

**TIL SØLU**
Grá, leðurlook babylift, Myrkabláur Chicco beriseli. Baby leikur kunnu fylgja við.
*Tlf. 449339 ella 261374*

**TIL SØLU**
Svartur Brio vognur við lift, puslitasku og fluguneti til sølu. Sær gott út.
*Tlf. 224338*

**»VOKS I POSE«**
vínreyður til sølu fyri 800,- kr. Brio barnavognur, grønur við reyðum terningum, til sølu fyri 1.500,-
*Tlf. 222694*

**KOYRISTÓLUR TIL SØLU**
Lítið brúktur og væl viðfarin. Regnslag, posi og tjúkkur vatntættur fótposi til. Fastir selar í stólinum.
*Tlf. 372333*

## Bátaútgerð

**TIL SØLU**
Lítið 5 mannafar, glasfibur, við páhangsmotori til sølu.
*Tlf. 215308*

**TIL SØLU**
Gear av merkinum Hurth til sølu.
*Tlf. 447769 - 260956*

**27 FÓT VIKSUND**
til sølu. Hevur fiskiloyvi og alla útgerð.
*Tlf. 443351, e. kl. 17*

**TIL SØLU**
Bayliner 24,60 føtur við 256 HK cmc Copra motori, ferð uml. 46 sm, til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 451091*

**TIL SØLU**
27 fót Viksund til sølu. Hevur fiskiloyvi, Volvo Penta motor, 95 hestar, er útgjørdur við VHF, sjálvstýrara, GBS plottara, ekkoloddi, 3 fullautomatiskum snellum og spæli.
*Tlf. 443351, e. kl. 18*

**LEYLAND**
Thornycraft 60 HK bátamotorur til sølu, í góðum standi.
*Tlf. 227809*

**TIL SØLU**
10-mannafar við 5 D fiskiloyvi upp til 15 tons.
*Tlf. 223492*

## Bingo

**GOTT JÓLABINGO**
verður í B36 húsinum mánakvøldið 10. des. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar, m.a. gávukort á 400 kr., dunnur, karamellur og før. krov. 6. og 12. spæl tvær stórar jólakurvar. Ókeypis kaffi og rís á la mande. Tvær mandlugávur. Drigið verður millum spølini. 15 plátur fyri 100 kr. Eykaspæl aftaná. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Spastikarafelagið*

**GOTT JÓLABINGO**
verður í Pálsstovu fríggjadagin 14. des. kl. 19.00. 400 kr. til fulla plátu. Drigið verður millum spølini. Á lutaseðlinum dunnur, før. gæs, turr tjógv og 2 før. røst krov. Koyring heim.
*Lymfødemfelagið*

**RIMMAR BINGO**
verður í Pállstovu 17/12 kl. 19.00. Koyring heim eftir bingo. Vit takka fyri stuðulin í ár 2001. Gleiðilig jól og gott nýggjár.
*Astma-/Allergifelagið*

**JÓLADUNNUSPÆL**
verður 8. des. kl. 16.00 í EB-húsinum. At vinna verður m.a. mikroovnur, dunnur, sodavatn og karamellur.
*EB*

**RIMMAR JÓLABINGO**
verður í Framtíðini 13. des. kl. 19.30. Annaðhvørt bingo tvær dunnur og annaðhvørt ein karamellueskja. Høvuðsvinningur á lutaseðli m.a. balja við alskyns jólamati. Eykaspæl verður aftaná. Søla av kaffi og rís á la mande verður í steðginum.
*7. fl. í Vágs skúla*

**GOTT JÓLABINGO**
verður leygardagin 8. des. kl. 20.00. At vinna: karamellur, dunnur, ræst kjøt og nógv annað. Eykaspæl verður.
*Tórshøll*

**BINGO**
verður í B36 húsinum hóskvøldið 13. desember. Full pláta 400 kr. 6.-12. spæl 800 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl, koyring heim. Á lutaseðli 3 gávukort á 1.000 kr.
*B36 stuðlar*

**JÓLABINGO**
verður í Róðrarneystinum á Argjum 15. des. kl. 15.00. At vinna m.a. gæs, dunnur, døgurðamatur, karamellur, gávukort o.a. Á lutaseðli m.a. før. krov. Eykaspæl. Koyring heim.
*Argja Róðrarfelag*

**GOTT JÓLABINGO**
verður í Stórhúshøll leygardagin 8. des. kl. 16.00. At vinna verður m.a. jóladekoratiónir, dunnur, sodavatn og karamellur. Høvuðsvinningar á lutaseðli eitt før. krov, eitt gávukort á 1.000 kr. Rís á la mande í steðginum.
*Í.F. Fótbóltur*

**HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG**
Gott jólabingo verður sunnudagin 9. des. kl. 16.00 í Avhaldshúsinum.
*Nevndin*

**BARNABINGO**
Gott barnabingo verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 8. desember kl 15. Nógv gott verður at vinna. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

## Burturm. /funnið

**FARTELEFON**
burturmist – Nokia 3310. Hon hevur danskt nr. og kann ikki nýtast við føroyskum sim-korti. Burturmist 26. nov., allarhelst við Statoil í Gundadali í Havn. Hon hevur ljósareytt/svart cover framman og aftan gjøgnumsiktugt violet. Er í tasku. Vinarliga sigið frá á tlf. 441539 - so veri eg glað. ÁSA
*Tlf. 441539*

**JAKKI BURTURMISTUR**
Tú sum (av misgáum) tók jakkan tann 1.12., vinarliga legg hann aftur í Club 20 ella ring 313090. Jakkin er stuttur ljóst brúnur, plyss.
*Tlf. 313090*

**KETTA BURTURBLIVIN**
Grá- og svørtstríput ketta, hvít undir øsinum, burturblivin. Kettan er seinast sædd í Kristiansgøtu í Hoyvík. Um nakar sær hana ring so vinarliga á
*tlf. 319056*

**SVØRT KETTA FUNNIN**
á Kommansmýru. Eigarin kann ringja á
*tlf. 316614*

**BURTURMIST**
Leygardagin 1/12 misti eg mína fartelefon á Tvøroyri. Um nakar hevur funnið hana so ring vinarliga á
*tlf. 373818*

## Býli

**ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU**
Miðhædd í sethúsum í Havn til leigu skjótast gjørligt. Køkur, 2 stovur, 3 kømur, pulturkamar og vaskirúm.
*Ring 312518*

**HÚS Á TVØROYRI**
til leigu. Nær við sjúkrahúsið, leigumál eftir nærri avtalu. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1236-3*

**HÚS TIL LEIGU**
Stór sethús miðskeiðis í Havnini til leigu frá 1. mars 2002. Uml. 300 kvm. innrættað – stór og góð rúm. Sera vælegnað til skrivstovur – rímilig parkering. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1236-1*

**KAMAR/ÍBÚÐ SØKIST**
Ungur maður við føstum arbeiði og fer væl um søkir eftir kamari ella íbúð í Havn, á Argjum ella í Hoyvík.
*Tlf. 219088*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
28 ára gomul genta søkir eftir íbúð í Keypmannahavn.
*Tlf. 22641069 - 32861047*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
til leigu í Havn. Vit eru tvey vaksin við einum barni. Gjalda til tíðina. Friðarlig og roykja ikki.
*Tlf. 216680*

**HÚS Í SANDAVÁGI**
til sølu, um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 332473 - 252965*

**LÍTIÐ FIRMA**
Lítið firma søkir erhvervshøli, íbúð ella hús!
*Tlf. +298 221021 - +4525362789*

**ÍBÚÐARNEYÐ**
Ungt par við eitt ára gomlum barni, søkir íbúð í Havn frá uml. 1. feb.
*Tlf. 252164*

**ÍBÚÐ Í KBH**
ella kamar v/ køk og bað ynskist til leigu frá uml. 21/12 til uml. 6/01. Møguleiki er fyri býti av húsi.
*Tlf. 314038 e. kl. 18*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
20 ára gamal drongur sóknast eftir íbúð í Havn fyri sámuligan prís.
*Ring 221950 - Jákup Bogi*

**VERILSI TIL LEIGU**
Gott verilsi til leigu v/ atgongd til køk og bað.
*Tlf. 313865*

**STÓR HÚS TIL LEIGU**
Uml. 110 fermetrar stór hús við lofti og kjallara til leigu fyri 8.000 kr. um mðr. u/ ljós og hita. Depositum krevst. Húsini eru egnað til nógv ymisk endamál.
*Tlf. 319584 - Fax 319984*

**TIL LEIGU**
Ovara hædd í húsum Undir Varða í Havn til leigu til friðarlig og røkin fólk. Húsini standa í sera friðarligum umhvørvi við blindveg, sera gott útsýni yvir Havnina. Íbúðin, ið er 103 fermetrar, hevur dur, gongd, 3 kømur, baðirúm, stovu, køk, hjall og vaskikjallara. Prísuppskot 6.000 kr. uttan hita og el.
*Tlf. 310667, e. kl. 18*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Ungur maður 27 ár, sóknast eftir íbúð í Havn ella Argjum frá 1. jan. 2002.
*Tlf. 310141*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Hevur nakar eina íbúð til leigu ella framleigu í Keypmannahavn, frá 1. jan. 2002 ella skjótast til ber.
*Tlf. 318529*

**HÚS/ÍBÚÐ**
ynskist til leigu í Havn ella Kollafirði skjótast gjørligt.
*Tlf. 0045 86280589*

## Dansur

**NORÐSTREYMOYAR**
DANSIFELAG hevur aðalfund 7. des. kl. 21.00 í Bjargingarf-elagshúsinum í Kollafirði. Hugnakvøld við dansi aftaná.
*Nevndin*